# NÁMSSKIPAN

FYRI ÚTBÚGVING TIL

# MASKINSMIÐ

YRKIS depilin

Útgávudagur 1. august 2025

*(fyri lærlingar, sum byrja skúlagongdina eftir 1. august 2025)*

Námsskipan fyri útbúgving til maskinsmið ........ 3
1 Um útbúgvingina ........ 3
2 Førleika- og lærumál ........ 3
3 Útbúgvingartíð, bygnaður og innihald ........ 7
4 Eftirmeting av skúlaskeiðum ........ 11
5 Sveinaroynd ........ 12
6 Endurpróvtøkur og sjúkrapróvtøka ........ 15
7 Kærumøguleikar ........ 16
8 Gildiskoma ........ 16
9 Námsætlanir til yrkislærugreinarnar ........ 17
Námsætlan 1: Arbeiðsumhvørvi ........ 17
Námsætlan 2: Amboðslæra ........ 18
Námsætlan 3: CAD-tekniforrit ........ 19
Námsætlan 4: CNC-tøkni ........ 20
Námsætlan 5: Fyrstahjálp ........ 21
Námsætlan 6: Eldsløkking ........ 22
Námsætlan 7: Maskinástøði ........ 23
Námsætlan 8: Montasja ........ 24
Námsætlan 9: Smiðjuarbeiði ........ 25
Námsætlan 10: Smiðjuástøði ........ 26
Námsætlan 11: Spóntakandi arbeiði ........ 27
Námsætlan 12: Stýringstøkni ........ 29
Námsætlan 13: Sveising ........ 30
Námsætlan 14: Tekning ........ 31
Námsætlan 15: Tilfarslæra ........ 32
Námsætlan 16: Motorlæra ........ 33

# Námsskipan fyri útbúgving til maskinsmið

<table>
<tr><th colspan="3">Námsskipan</th></tr>
<tr><td colspan="3">Námsskipan fyri útbúgving til maskinsmið, seinast dagførd 1. august 2025. Yrkisnevndin hevur samtykt hesar útbúgvingarreglur sambært yrkisútbúgvingarlógini, felagskunngerðini og útbúgvingarkunngerð nr. 131 frá 19. september 2022 um útbúgvingar innan maskin og framleiðslu.</td></tr>
<tr><td rowspan="2">Yrkisdepilin<br>Hoydalsvegur 1<br>100 Tórshavn<br>Telefon: 30 65 60<br>www.yrkisdepilin.fo<br>yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo</td><td colspan="2">Skúlar sum bjóða útbúgvingina</td></tr>
<tr><td>Glasir<br>Janusargøta 3<br>100 Tórshavn<br>Telefon: 61 66 00<br>www.glasir.fo<br>post@glasir.fo</td><td>Tekniski skúlin í Klaksvík<br>Mýrivegur 2<br>700 Klaksvík<br>www.tsk.fo<br>tsk@tsk.fo</td></tr>
<tr><td colspan="3">Til ber at venda sær til Yrkisdepilin og skúlarnar við spurningum um útbúgvingina og fyri at fáa meiri kunning um útbúgvingina.<br><br>Um ósamsvar er millum námsskipanina og útbúgvingarkunngerðina, so er tað altíð útbúgvingarkunngerðin, sum er galdandi!</td></tr>
</table>

# 1 Um útbúgvingina

Endamálið við útbúgvingini er ásett í kapitli 1 í útbúgvingarkunngerðini. Útbúgvingin sum maskinsmiður er sergrein sbrt. § 2, stk. 2, nr. 1 í útbúgvingarkunngerðini.

Útbúgvingin tekur 4 ár, og er lutað sundur í verkliga læru á góðkendum læruplássi og skúlagongd í góðkendum yrkisskúla.

# 2 Førleika- og lærumál

Førleikamálini fyri hvat lærlingurin skal duga við lokna útbúgving eru ásett í kapitli 3 í útbúgvingarkunngerðini og endurgivin niðan fyri í 2.1. Í kunngerðini eru ásett nøkur felags førleikamál, tvs. fyri allar útbúgvingarnar innan maskin og framleiðslu, og førleikamál fyri hvørja sergrein sær. Í hesi námsskipan verða førleikamálini fyri útbúgvingina knýtt at lærugreinum í skúlunum og at verkligu lærumálunum fyri læruplássini. Verkligu lærumálini eru ásett í parti 2.1 og lærumálini fyri hvørja lærugrein sær eru ásett í parti 9.

## 2.1 Førleikamál við útbúgvingarlok

Felags førleikamál fyri útbúgvingar innan maskin og framleiðslu eru ásett í útbúgvingarkunngerðini, og hesi eru, at lærlingurin dugir:

1. Ástøði. Grundleggjandi ástøðilig vitan, sum styðjar undir verkligt arbeiði.
2. Tilfarslæra. Grundleggjandi vitan um ymisk sløg av stáli, rustfrítt stál, aluminium, kopar, bronsa, nylon o.a.
3. Amboð og maskinur. Holla vitan um hondamboð og maskinur.
4. Uppmerking. Máting, mátiamboð, uppmerking og góðskutrygging.
5. Tilskering og tilevning. Mekanisk og termisk skering, dreying og fresing, sveising og lodding o.a.
6. Keldur. At finna galdandi normar o.a. á skrift ella teldu.
7. Tekning. Faktekning við hond og við teldu.
8. Umhvørvi og persónlig trygd. Rudding og trygd eftir reglum. Fakligar reglur, brandhjálp og fyrstahjálp.
9. Skjalføring. Frágreiðing. Kundatænasta.
10. Verk. Grundleggjandi hegni sum breiður smiður.

Førleikamálini fyri sergreinina sum maskinsmið eru ásett í § 13 í útbúgvingarkunngerðini og eru hesi:

1. at samskifta og samstarva fakligt í fyritøkuni,
2. at arbeiða við góðsku í huga og hava kunnleika til góðskustýringarskipanir,
3. at sýna hugflog í arbeiði sínum við konstruktión og framleiðslu innan yrkisøkini í útbúgving sínari,
4. at vera tilvitaður um heilsu, trygd og umhvørvið, HTU, í arbeiðsuppgávum í útbúgving sínari,
5. at leggja til rættis og framleiða lutir á hondstýrdum spóntakandi maskinum,
6. at gera arbeiðstekningar við støði í CAD tekniforritum,
7. at útinna uppbygging, forritan, feilfinnan og umvæling av einføldum stýringartekniskum skipanum,
8. at duga at velja røtt amboð og rætta dátugrundarlagið í sambandi við framleiðsluuppgávur,
9. at eftirkanna mát og skjalprógva útintar uppgávur,
10. at stilla og viðlíkahalda arbeiðsamboð og mátiamboð,
11. at rætta, stilla og viðlíkahalda maskinur,
12. at nýta CNC forrit sambært tekningum,

13. at sýna góðskutilvitan, tá uppgávur verða útintar. Hesin førleiki fevnir um málmáting og aðra góðskumáting við nýtslu av skjótilæru og mikrometurmátiamboðum, við atliti at galdandi standardum,
14. at samskifta og gera avtalur við viðskiftafólk grundað á vitan um kundarøkt,
15. at skilliga samskifta um arbeiðsstøðuna á fremmandamáli,
16. at viðlíkahalda, montera og demontera høvuðspartarnar av einum motori og útinna einfaldar umvælingaruppgávur og viðlíkahaldsuppgávur av rørskipanum, pumpum, ventilum og øðrum mekaniskum og tekniskum skipanum,
17. at brúka KT í sambandi við dagligu arbeiðsuppgávurnar. Eitt nú at leita eftir viðkomandi tekniskum og fakligum upplýsingum,
18. at leggja til rættis og gera minni konstruktiónir av plátu, røri og stálprofilum í einari framleiðslutilgongd, umvælingartilgongd og viðlíkahaldstilgongd, og
19. at útinna samansetingarhættir í eini framleiðslutilgongd samsvarandi galdandi standardum, íroknað mekanisk og termisk skering, sveising og lodding við meira.

## 2.2 Verklig lærumál

Eitt virki skal lúka ávís verklig lærumál og hava ávísa útgerð tøka fyri at fáa læruplássgóðkenning. Førleikamál fyri lærugreinar og verkligu lærumálini skulu tryggja, at lærlingur eftir lokna útbúgving lýkur ásettu førleikamálini fyri útbúgvingina.

Í talvu 1 eru verkligu lærumálini fyri maskinsmiðútbúgvingina ásett. Í talvuni verður eisini víst á, hvørji útbúgvingarførleikamál í parti 2 einstøku verkligu lærumálini styðja. Talmerkingin av útbúgvingarførleikamálunum vísir til talmerkingina í parti 2. Í talvu 2 er yvirlit yvir kravda útgerð.

*Talva 1: Verkligu lærumálini og yvirlit yvir hvørji førleikamál, ið verkliga læran styðjar.*

| Nr. | Tilvísing til førleikamál (§13) | Mál fyri verkligu læruna |
|---|---|---|
| 1 | 1 | loysa arbeiðsuppgávur við samskifti og fakligum samstarvi á arbeiðsplássinum, |
| 2 | 4 | duga at skyna á og sýna tilvit um heilsu, trygd og umhvørvi tá arbeiðsuppgávur verða loystar og á arbeiðsplássinum sum heild, |
| 3 | 5 | tilvitað velja skeringsamboð til ymiskt tilfar, |
| 4 | 5 | leggja til rættis og framleiða lutir á hondstýrdum spóntakandi maskinum, |
| 5 | 2, 7 | útinna uppbygging, forritan, feilfinnan og umvæling av einføldum stýringstekniskum skipanum, |
| 6 | 8 | duga at velja røttu amboð til ítøkiligar framleiðsluuppgávur, |
| 7 | 10 | stilla og viðlíkahalda arbeiðsamboð og mátiamboð, |

| | | |
|---|---|---|
| 8 | 11 | rætta, stilla og viðlíkahalda maskinur, |
| 9 | 13 | góðskutilvitan í málmáting við nýtslu av skjótilæru og mikrometurmátiamboðum, við atliti at galdandi standardum, |
| 10 | 3, 16 | viðlíkahalda, montera og demontera høvuðspartarnar av einum motori og útinna einfaldar umvælingaruppgávur og viðlíkahaldsuppgávur av rørskipanum, pumpum, ventilum og øðrum mekaniskum og tekniskum skipanum, |
| 11 | 17 | brúka KT í sambandi við dagligu arbeiðsuppgávurnar. Eitt nú at leita eftir viðkomandi tekniskum og fakligum upplýsingum, |
| 12 | 3, 5 | leggja til rættis og gera minni konstruktiónir av plátu-, rør- og stálprofilum í einari framleiðslutilgongd, umvælingartilgongd og viðlíkahaldstilgongd, |
| 13 | 19 | útinna samansetingarhættir í eini framleiðslutilgongd samsvarandi galdandi standardum, íroknað mekanisk og termisk skering, sveising og lodding við meira, |
| 14 | 9 | duga at eftirkanna mát og |
| 15 | 9 | duga at skjalprógva loystar uppgávur. |
| | | Eyka, men ikki kravd verklig lærumál: |
| 16 | 6 | gera arbeiðstekningar við støði í CAD tekni forritum, |
| 17 | 12 | nýta CNC forrit sambært tekningum. |

*Talva 2: Yvirlit yvir kravda útgerð*

| **Yvirlit yvir kravda útgerð** |
|---|
| Dreygibonkur |
| Fresari |
| Mátitól, skjótilærir, mikrometurskrúir |
| Soylubormaskinu |
| Pressa |
| Autogensett |
| Sveisiútgerð, elektrodu, tig, mig/mag |
| Hondamboð til at skrúva motorar, gear o.a. |

Fyri at røkka førleikamálunum fyri útbúgvingina, skal læruplássið leggja verkligu læruna soleiðis til rættis, at lærlingurin fær høvi til at arbeiða við uppgávunum, sum nevndar eru í talvu 1.

Læruplássið váttar við starvsváttan eftir lokna lærutíð, at lærlingur hevur arbeitt við nevndu økjum/uppgávum.

# 3 Útbúgvingartíð, bygnaður og innihald

Útbúgvingartíðin er 4 ár. Skúlagongdin í útbúgvingini er 55 vikur, íroknað eitt sveinaroyndarskeið. Skúlagongdin er lutað í fýra skúlaskeið og eitt sveinaroyndarskeið og verður skipað samsvarandi talvu 3.

*Talva 3: Skipan av skúlagongd og longd á skúlaskeiðum*

| Skúlaskeið | Vikur | Undirvísingartímar |
|---|---|---|
| 1. skúlaskeið | 20 | 720 |
| 2. skúlaskeið | 10 | 360 |
| 3. skúlaskeið | 10 | 360 |
| 4. skúlaskeið | 10 | 360 |
| Sveinaroyndarskeið | 5 | 180 |
| Tilsamans | 55 | 1980 |

Felagskunngerðin (nr. 83 frá 2013) ásetur sambært § 6, stk. 1, pkt. 2, at skemalagda undirvísingarvirksemið í mesta lagi fevnir um 36 undirvísingartímar (undirvísingartímar) um vikuna, tvs. at eitt skúlaskeið á 20, 10 og 5 vikur í mesta lagi hevur ávikavist 720, 360 og 180 undirvísingartímar.

Skúlagongdin í útbúgvingini fevnir um almennar lærugreinar sbrt. § 5 í útbúgvingarkunngerðini, vallærugreinar og yrkislærugreinar sbrt. §§ 7 og 8 í útbúgvingarkunngerðini. Skúlaundirvísingin skal í byrjanini geva eina breiða heildarfatan og seinni miðar undirvísingin ímóti at veita lærlingum neyðugan førleika í ávísum yrki (§ 11, stk. 2 í yrkisútbúgvingarlógini).

Lærugreinarnar verða lýstar við einum lærugreinastigi, sí nærri í 3.1 – 3.3, og nærri lýstar við innihaldi og førleikamálum í námsætlanum í parti 9.

Í útbúgvingarkunngerðini er ásett undirvísingartímatøl fyri almennar lærugreinar hvør sær og samlaða talið av undirvísingartímum fyri yrkislærugreinar. Skemlagda undirvísingartímatalið fyri almennar lærugreinir eru sambært § 5, stk. 2 í útbúgvingarkunngerðini 360 undirvísingartímar, har hvør lærugrein hevur 72 undirvísingartímar. Skemalagda tímatalið til yrkislærugreinar er til samans 1.248 undirvísingartímar sambært § 7, stk. 1. Harumframt eru ásettar 120 undirvísingartímar til yrkisvallærugreinar sbrt. § 8.

Klokkutímatalið verður umroknað til undirvísingartímatal (klokkutímar x 4/3 = undirvísingartímar), sí yvirlit fyri undirvísingartímatøl í talvu 4.

Eftirmeting verður skipað eftir hvørt skúlaskeið. Eftirmeting kann verða við luttøku (L), støðumeti (S) og próvtøku (P), sí nærri í partinum um eftirmeting. Í útbúgvingarkunngerðini er ásett, at 72 undirvísingartímar eru settar av til hesa eftirmeting.

Í talvu 4 er yvirlit yvir lærugreinar og býtið av tímatølum. Býtið av lærugreinum millum skúlaskeiðini verður lagt soleiðis til rættis, at undirvísingin í mest møguligan mun styðjar verkliga partin av útbúgvingini. Í talvuni er eisini yvirlit yvir lærugreinastig og tilvísing er til nr. á námsætlan fyri hvørja lærugrein sær. Í talvuni síggjast eisini hvørji útbúgvingarførleikamál í parti 2.1, ið lærugreinarnar styðja. Talmerkingin av førleikamálunum vísir til talmerkingina í parti 2.1.

*Talva 4: Yvirlit fyri lærugreinar, lærugreinastig, undirvísingartímar og eftirmeting.*

| Førleikamál | Lærugrein | Lærugreinastig | Undirvísingartímar | Eftirmeting[1] |
|---|---|---|---|---|
| | **Almennar lærugreinar:** | | | |
| §13: 18 | Alisfrøði | E | 72 | S/P |
| §13: 1, 14, 15 og 17 | Enskt | E | 72 | S/P |
| §13: 1, 14 og 17 | Føroyskt | E | 72 | S/P |
| §13: 9, 10, 13 og 18 | Støddfrøði | E | 72 | S/P |
| | Vallærugrein | E | 72 | S/P |
| **Í alt** | | | **360** | |
| | **Yrkislærugreinar:** | | | |
| §11: 8; §13: 4 og 8 | Arbeiðsumhvørvi (1) | Byrjanarstig | 10 | L |
| §11: 1, 2 og 3 ;§13: 8, 10 og 13 | Amboðslæra (2) | Vanastig | 50 | S |
| §11: 7; §13: 6, 11, 12 og 17 | CAD tekniforrit (3) | Vanastig | 64 | S |
| §11: 3, 6 og 7; §13: 2, 3, 8, 11, 12 og 17 | CNC-tøkni (4) | Byrjanarstig | 70 | L/S |
| §11: 8 | Fyrstahjálp (5) | Byrjanarstig | 12 | L |
| §11: 8 | Eldsløkking (6) | Byrjanarstig | 4 | L |
| §11: 1 og 2; §13: 5, 8, 10, 13, 14 og 17 | Maskinástøði (7) | Framkomið stig | 100 | P/S |
| §11: 1 og 2; §13: 2, 3, 8, 10, 11, 16 og 17 | Montasja (8) | Vanastig | 152 | L/S |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| §11: 1 og 2; §13: 18 og 19 | Smiðjuarbeiði (9) | Byrjanarstig | 52 | P |
| §11: 1 og 2; §13: 18 og 19 | Smiðjuástøði (10) | Byrjanarstig | 28 | P |
| §11: 1 og 2; §13: 2, 3,5 ,8-11, 13 og 17 | Spóntakandi arbeiði(11) | Framkomið stig | 462 | P/S |
| §11: 1 og 2; §13: 2, 7 og 17 | Stýringstøkni (12) | Vanastig | 80 | L/S |
| §11: 1 og 2; §13: 18 og 19 | Sveising (13) | Vanastig | 96 | P |
| §11: 7; §13: 3 og 17 | Tekning (14) | Byrjanarstig | 44 | S |
| §11: 1, 2 og 8; | Tilfarslæra (15) | Vanastig | 24 | L |
| **Í alt** | | | **1248** | |
| | **Vallærugrein:** | | 120 | |
| §11: 1, 2 og 8; §13: 1, 4, 11 og 16 | Motorlæra (16) | Framkomið stig | 120 | |
| | Sveising (17) | Framkomið stig | 120 | |
| | Eftirmeting | | 72 | |
| | Sveinaroynd | | 180 | |
| **Samanlagt** | | | **1980** | |

[1] S: støðumet, L: luttøka, P: próvtøka

## 3.1 Nærri um almennar lærugreinar

Almennu lærugreinarnar fevna um ástøðiliga undirvísing, ið skal miða ímóti at menna tann almenna kunnleikan hjá lærlinginum og styðja undirvísingina í yrkislærugreinunum. Somuleiðis skulu almennu lærugreinarnar styrkja persónliga menning, lestrarførleika og samfelagsfatan. Í útbúgvingarkunngerðini eru almennar lærugreinar ásettar at vera á stig E. Tað ber tó til í ávísum førum hjá lærlingi at velja lærugrein á hægri stigi. Tað er tó upp til einstaka skúlan at meta um, hvørt tað er møguligt og letur seg gera.

Útbúgvingin til maskinsmið hevur hesar almennu lærugreinarnar:

- **Lærugreinin alisfrøði** skal geva lærlinginum vitan og innlit í alisfrøðilig fyribrigdi, hugtøk og arbeiðshættir, sum hava týdning fyri arbeiði innan yrkið.

  Sí leinki: Alisfrøði E - namsaetlanir.fo

- **Lærugreinin enskt** skal menna førleikarnar hjá lærlinginum at samskifta á enskum máli um tær fakligu uppgávurnar, sum arbeitt verður við. Við hesum mennist orðavalið hjá lærlinginum, og lærlingurin fær betri førleikar at samskifta.

  Sí leinki: Enskt E - namsaetlanir.fo

- **Lærugreinin føroyskt** skal menna førleikarnar hjá lærlinginum at samskifta á føroyskum máli um tær fakligu uppgávurnar, sum arbeitt verður við. Við hesum mennist orðavalið hjá lærlinginum, og lærlingurin fær betri førleikar at samskifta.

  Sí leinki: Føroyskt - namsaetlanir.fo

- **Lærugreinin støddfrøði** er grundleggjandi fortreyt í øllum teimum uppgávum, sum lærlingurin arbeiðir við. Serliga eru tað teir grundleggjandi førleikarnir, sum verða nýttir – flatamál/vídd, mongd, prísir, handilsrokning, brot, geometri, umframt meira framkomnir roknihættir so sum trigonometri.

  Sí leinki: Støddfrøði E - namsaetlanir.fo

- **Vallærugrein** Maskinsmiðútbúgvingin hevur eina almenna vallærugrein, sum skúlin bjóðar út.

  Sí leinki til yvirlit yvir almennar lærugreinir: Yrkisnám - namsaetlanir.fo

## 3.2 Nærri um vallærugreinar

Vallærugreinarnar skulu miða eftir at nøkta áhugamál lærlingsins, at stuðla áhugan fyri framhaldandi útbúgving og at menna yrkis- og lestrarførleikan. Vallærugreinarnar skulu eisini stimbra vanligu førleikakrøvini og arbeiðsmøguleikarnar í samfelagnum.

## 3.3 Nærri um yrkislærugreinar

Námsætlanirnar fyri einstøku yrkislærugreinarnar síggjast í fylgiskjølunum. Yrkislærugreinarnar sermerkja læruna til maskinsmið og skulu veita almennan kunnleika og fakligan yrkisførleika. Partar av yrkislærugreinunum eru serlærugreinar, ið eru á hægsta fakliga stigi innan yrkið, og fata tær um verkliga og ástøðiliga undirvísing, sum skal miða ímóti at veita lærlinginum serligan yrkisførleika sum maskinsmiður.

Førleikamátini fyri yrkislærugreinarnar eru í trimum stigum, so til ber er at gera ein karm um lýsing, skjalprógvan og sýning av stigunum og framgongdini í undirvísingini í mun til uppgávurnar. Arbeitt verður á trimum stigum, ið vísa til torleikastigini í námsætlanunum: byrjanarstig, vanastig og framkomið stig.

### Byrjanarstig

Lærlingurin dugir at loysa eina uppgávu og arbeiða í vandum førum ella út frá einum kendum greiðsluevni, ella hann dugir at gera torførari arbeiði við vegleiðing. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til at seta seg inn í grundleggjandi kunnleika- og hegnisøki í

útbúgvingini, og førleikar til at menna ábyrgd og grundarlag til framhaldandi læring. Á byrjanarstigi skal sjálvstøði somuleiðis verða grundfest í samband við at uppgávur verða loystar.

### Vanastig

Lærlingurin dugir at tilrættarleggja og loysa eina uppgávu við vandum ella kendum greiðsluevnum og umhvørvi, sjálvstøðugt og í samstarvi við onnur. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til sjálvstøðugt at seta seg inn í torskildari greiðsluevni og at samskifta við onnur um loysnirnar. Afturat hesum verður dentur lagdur á smidleika og tillagingarevni.

### Framkomið stig

Lærlingurin dugir at meta um ein trupulleika, tilrættisleggja, loysa og fremja eina uppgávu ella at loysa ein trupulleika, eisini í óvandum førum – einsamallur ella í samstarvi við onnur – við atliti at uppgávuni. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til sjálvstøðugt at taka ábyrgd og at sýna virkisanda til sjálvur at orða og loysa fakligar og sosialar uppgávur og trupulleikar. Afturat hesum verður dentur lagdur á tilvitan um góðsku og skapanarevni.

# 4 Eftirmeting av skúlaskeiðum

Eftirmeting verður skipað eftir hvørt skúlaskeið. Eftirmeting kann verða við luttøku (L), støðumeti (S) og próvtøku (P). Luttøkuváttan kann bert latast fyri lærugreinar við minni enn 30 undirvísingartímum. Í námsætlanini fyri hvørja lærugrein í parti 9 er ásett, hvat fyri eftirmeting verður brúkt fyri hvørja lærugrein sær.

### Skúlaskeið 1

Eftirmett verður innan yrkislærugreinar í smiðju- og maskinyrkinum.

**Eftirmetingarháttur:**

- Tveir ástøðiligir partar, ið umfata ástøðiliga partin av yrkislærugreinunum innan smiðju- og maskinøkið. Tvær skrivligar royndir á 2 klokkutímar fyri hvørja.
- Tveir verkligir partar, ið umfata smiðju- og maskinøkið.
    - Lærlingur fær 16 undirvísingartímar at fremja eina bundna uppgávu innan sveising, plátuarbeiði og rørarbeiði. Við støði í verkligu royndini verður hildin ein munnlig samrøða/roynd á 20 minuttir, íroknað próvtalsgeving.
    - Lærlingur fær 16 undirvísingartímar at fremja eina bundna uppgávu innan dreying og fresing (8 tímar til hvørt). Munnlig samrøða/roynd á 20 minuttir, íroknað próvtalsgeving.

**Døming:**

- Ein lærari og ein uttanhýsis metingardómari próvdøma.

- Eitt próvtal verður latið fyri ástøðiliga partin fyri maskinøkið og eitt próvtal fyri smiðjuøkið
- Eitt próvtal verður latið fyri verkliga partin fyri maskinøkið- og eitt próvtal fyri smiðjuøkið.
- Fyri at standa skal lærlingur í minsta lagi hava fingið próvtali 02 fyri ástøðiligu partarnar og 02 fyri verkligu partarnar hvør sær.

### Skúlaskeið 2-4

Eftirmett verður innan yrkislærugreinar í maskinyrkinum. 16 undirvísingartímar verða settir av til eftirmeting fyri hvørt av skúlaskeiðunum 2-4.

**Eftirmetingarháttur:**

- Ástøðiligur partur, ið umfatar yrkislærugreinarnar innan maskinsmið økið. Skrivlig roynd á 2 klokkutímar.
- Verkligi parturin er ein verkætlan, ið er ein bundin uppgáva, sum lærlingurin fær útflýggjaða, tá skúlaskeiðið byrjar, og sum lærlingurin arbeiðir við gjøgnum skúlaskeiðið. Munnlig samrøða/roynd á 20 minuttir, íroknað próvtalsgeving.

**Døming:**

- Minst tveir lærarar próvdøma ástøðiliga og verkliga partin.
- Fyri at standa skal lærlingur í minsta lagi hava fingið próvtali 02 fyri ástøðiliga partin og 02 fyri verkliga partin.

# 5 Sveinaroynd

Sveinaroyndin er partur av sveinaroyndarskeiðnum, ið skúlin skipar fyri, og sum varir 5 vikur. Fyri at innskriva seg til sveinaroyndarskeiðið skal lærlingurin hava staðið 1. – 4. skúlaskeið, og hava góðkendan lærusáttmála sbrt. § 16, stk. 1 í kunngerð um felagsreglur fyri yrkisútbúgvingar.

Umframt sjálva sveinaroyndina, fevnir sveinaroyndarskeiðið eisini um fyrireiking til sveinaroyndina, ið skúlin skipar fyri. Skúlin leggur til rættis tíðarætlan fyri sveinaroyndarskeiðið, ið lærlingurin fær útflýggjaða, tá ið hann verður boðsendur at møta.

Kunngerð um próvtøkur í yrkislærugreinum og fremjingarreglur fyri yrkis- og sveinaroyndir ásetur reglur um uppgávur, tilnevning av metingardómarum, ábyrgdarfólk og ansara.

Sveinaroyndin fevnir um tveir høvuðspartar: ein ástøðiligan part og ein verkligan part.

Til fyrireiking av sveinaroyndini eru ásettir 96 undirvísingartímar.

Skúlarnir leggja sveinaroyndina nærri til rættis og tilskila tímatalið fyri sveinaroyndartíðarskeiðið.

## 5.1 Ástøðiligi parturin av sveinaroyndini

**Próvtøkuháttur:**

- Ástøðiligi parturin av sveinaroyndini fevnir um eina skrivliga roynd á 2 klokkutímar.
- Royndin er við loyvdum hjálparmiðlum, ið eru fylgiskjøl og lummaroknari, sum skúlin hevur góðkent.

**Døming:**

- Ein lærari og tveir metingardómarar døma skrivligu royndina.
- Eitt próvtal verður latið fyri skrivligu royndina.
- Fyri at standa ástøðiliga partin av sveinaroyndini skal lærlingurin í minsta lagi hava fingið próvtali 02 fyri skrivligu royndina.

## 5.2 Verkligi parturin av sveinaroyndini

**Próvtøkuháttur:**

- Verkligi parturin av sveinaroyndini fevnir um eina dreyiuppgávu, eina fresiuppgávu og eina handverksuppgávu. Til verkliga partin av sveinaroyndini eru 45 klokkutímar ásettir, og skúlin ásetur tímarnir, ið verða býttir á uppgávurnar.
- Verkætlanin skal fevna um:
    - Uppskot um uppgávuloysn
    - Uppmátingar
    - Tilfarslista, har grundgivið verður fyri vali av tilfari
    - Val av maskinum og amboðum
- Verkligi parturin endar við eini samrøðu á 20 minuttir.

**Døming:**

- Ein lærari og tveir metingardómarar døma verkligu royndina.
- Fyri at standa verkliga partin, skal lærlingurin hava fingið í minsta lagi 02 í einstøku pørtunum av royndini.
- Fyri verkliga partin av sveinaroyndini geva lærarin og báðir metingardómararnir eitt próvtal.
- Í dømingini verður dentur lagdur á:
    - Nágreini á mátum og vinklum
    - Handverklig dygd

- Heildarmeting

**Nærri um verkliga partin:**

Skúlin ger av, nær royndin byrjar og endar, umframt hvørjar arbeiðstíðirnar eru.

Áðrenn verkliga royndin byrjar, skal ansarin býta út verkligu uppgávurnar og kunna lærlingarnar um m.a.:

- Tíðir fyri nær royndin byrjar og endar.
- Arbeiðstíð og steðgir.
- Tilfar og rudding.
- Atkomu- og rýmingarleiðir og um at halda hesar leiðir fríar.
- Staðseting av útgerð til eldsløkking.
- Nýtslu av amboðum, sum lærlingurin kann gera brúk av.
- Goymslu av amboðum uttan fyri arbeiðstíð.
- Aðrar skilhaldsreglur, undir hesum forboð móti rúsevnum, royking og tendraðum fartelefonum.
- Fylgja trygdarreglum sum eru galdandi á verkstaði
- At lærlinguirn ikki hevur loyvi at móttaka hjálp frá øðrum.
- Avleiðingarnar um hesar reglur ikki verða fylgdar.

## 5.3 Endaligt sveinaroyndarpróvtal

Ástøðiligi og verkligi parturin av sveinaroyndini skal standast hvør sær fyri at standa sveinaroyndina. Endaliga sveinaroyndarpróvtalið verður roknað sum eitt vektað miðaltal við einum desimali av próvtalinum fyri ástøðiliga partin og próvtalinum fyri verkliga partin av sveinaroyndini.

Próvtalið fyri ástøðiliga partin skal vektast við ¼ og próvtalið fyri verkliga partin vektast við ¾.

Í sveinaroyndini verður lærlingurin mettur sambært niðanfyristandandi próvtalsstiga:

*Talva 5: próvtalsstigi.*

| Próvtal | Merking | Lýsing |
|---|---|---|
| 12 | Fyri framúr gott avrik | Próvtalið 12 verður givið fyri avrik, sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini. |
| 10 | Fyri sera gott avrik | Próvtalið 10 verður givið fyri sera gott avrik, ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini. |
| 7 | Fyri gott avrik | Próvtalið 7 verður givið fyri gott avrik, ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini. |

| | | |
|---|---|---|
| 4 | Fyri hampiligt avrik | Próvtalið 4 verður givið fyri hampiligt avrik, ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl. |
| 02 | Fyri toluligt avrik, sum kann verða góðtikið | Próvtalið 02 verður givið fyri toluligt avrik, ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini. |
| 00 | Fyri ikki nøktandi avrik | Próvtalið 00 verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini. |
| -3 | Fyri heilt vánaligt avrik | Próvtalið -3 verður givið fyri heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið. |

Tá ið liðugt er at próvdøma sveinaroyndina, skal oyðublað hjá Yrkisdeplinum við endaligu próvtølunum fyri hvønn lærling sær sendast til Yrkisnevndina/Yrkisdepilin.

*Talva 6: Orðingar í sveinabrævi.*

| Próvtal | Orðing í sveinabrævi |
|---|---|
| 11,5 – 12,0 | Góðkent við silvur |
| 11,0 – 11,4 | Góðkent við bronsu |
| 8,5 – 10,9 | Góðkent við rós |
| 2,0 – 8,4 | Góðkent |

# 6 Endurpróvtøkur og sjúkrapróvtøka

Um lærlingurin gerst sjúkur áðrenn ella meðan sveinaroyndin er, og ikki er førur fyri at greiða úr hondum sveinaroyndina, áseta skúlin og yrkisnevndin eina sjúkrapróvtøku skjótast gjørligt eftir at lærlingurin er vorðin frískur. Um sjúka bert ávirkar annan partin av sveinaroyndini, so verður endurpróvtøka bert skipað fyri partin, sum lærlingur ikki fekk luttikið í vegna sjúku, t.d. um lærlingur hevur staðið ástøðiligu royndina, so verður endurpróvtøka bert skipað fyri verkliga partin av sveinaroyndini.

Um lærlingur ikki stendur sveinaroyndina, skulu metingardómararnir beinanvegin boða skúlanum og yrkisnevndini frá hesum, og geva eina stutta skrivliga frágreiðing um orsøkina til, at lærlingurin ikki stóð royndina. Metingarskjøl, sum eru útfylt á nøktandi hátt, kunnu góðgera frágreiðingina.

Skúlin skal hareftir skjótast gjørligt seta seg í samband við lærlingin og læruplássið fyri at fáa greiðu á, hví lærlingurin ikki stóð royndina, og fyri at greiða frá hvørjar møguleikar lærlingurin og læruplássið hava, og fyri at finna út av hvat skal gerast víðari. Um lærlingurin og læruplássið eru samd um, at lærlingurin skal fara til nýggja sveinaroynd, og lærusáttmálin gongur út áðrenn lærlingurin hevur staðið sveinaroyndina, skal lærusáttmálin leingjast, soleiðis at hann er galdandi alla sveinaroyndina. Leinging av lærusáttmála verður gjørd á oyðublaði, ið er gjørt til hetta endamál. Umsókn um leinging av lærusáttmála verður send Yrkisdeplinum.

Um lærlingurin gerst sjúkur undir eftirmetingini av skúlaskeiðunum, gera skúlin og læruplássið avtalu um, hvussu skal farast fram og nær nýggj roynd skal vera.

# 7 Kærumøguleikar

Í felagskunngerðini fyri yrkisútbúgvingar eru ásetingar um kærur av fyrisitingarligari avgerð í § 37, um próvtøku í almennum lærugreinum í § 37-41, og um yrkis- og sveinaroynd í § 42.

# 8 Gildiskoma

Námsskipanin er galdandi fyri lærlingar, sum byrja 1. ella 2. skúlaskeið eftir 1. august 2025.

# 9 Námsætlanir til yrkislærugreinarnar

## Námsætlan 1: Arbeiðsumhvørvi

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 10

### Lýsing av lærugreinini

Í undirvísingini verða evnir viðvíkjandi arbeiðsmarknað av týdningi fyri arbeiðsumhvørvið viðgjørd. Dentur verður lagdur á lógir og reglur annars, ið regulera arbeiðsmarknaðin og skil fæst á, hvørjir myndugleikar hava týdning og avgerðarmyndugleika.

### Førleikamál fyri lærugreinina

- at duga at finna og brúka vitan um kroppsliga, sálarliga og evna- og lívfrøðisliga ávirkan á arbeiðsumhvørvi og fyribyrgja áðurnevndu ávirkan.
- at eftirmeta og betra um nærvið og næstan vanlukkur.
- at leggja tilrættis eina arbeiðsuppgávu á ein tryggan hátt.
- at burturbeina rusk á rættan hátt.

-

### Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags § 11 nr. 8.

Sergrein: § 13 nr. 4 og 8.

### Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við luttøkuváttan.

# Námsætlan 2: Amboðslæra

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Vanastig
**Vegleiðandi tímatal**: 50

## Lýsing av lærugreinini

Í undirvísingini verður dentur lagdur á, hvørji handamboð eru viðkomandi til uppgávurnar hjá einum maskinsmiði og at hesi verða nýtt á ein tryggan hátt.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin dugir at velja, nýta og viðlíkahalda tað rætta handamboði til eina givna uppgávu.
- At lærlingurin dugir at leggja tilrættis trygd á arbeiðsstaðnum við atliti til umhvørvislógina, so sum ergonomi, larm, støv o.a.
- At lærlingurin dugir at nýta stationerar/støðufastar maskinur eitt nú: Bandsag, maskinsag, slípimaskinur, hydrauliska pressu og søjluborumaskinur, umframt at nýta viðkomandi stuðulsamboð til hesar maskinur.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

| | | |
|---|---|---|
| Førleikamál: Felags: | | § 11 nr. 1, 2 og 3. |
| Sergrein: | | § 13 nr. 8, 10 og 13. |

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumeti.

# Námsætlan 3: CAD-tekniforrit

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Vanastig
**Vegleiðandi tímatal**: 64

## Lýsing av lærugreinini

Í undirvísingini verður arbeitt við at framleiða arbeiðstekningar og aðra framleiðsluskjalprógvan sambært galdandi standardum við støði í Cad tekniforritum.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin dugir at framleiða arbeiðstekningar og aðra framleiðsluskjalprógvan sambært galdandi standardum við støði í Cad- tekniforritum.
- At lærlingurin dugir at nýta Cad-tekniforrit til rættvinklaða projektiónstekning sambært tekniregulum.
- At lærlingurin dugir at nýta Cad-tekniforrit til ISO-metriska tekning sambært tekningsreglum.
- At lærlingurin við støði í omanfyrinevnda dugir at framleiða arbeiðstekningar í samband við arbeiðs- og montasjuppgávur.

## Lærugreinin styðjar fylgjand førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 7.

Sergrein: § 13 nr. 6, 11, 12 og 17.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumeti.

# Námsætlan 4: CNC-tøkni

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 70

## Lýsing av lærugreinini

Í undirvísingini verður arbeitt við evnitekningum og at framleiða CNC-programmir við brúk av ISO kodum.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin dugir at avlesa punktir í einari 2. og 3. aksaðari krosskipan, umframt at útrokna ókend punkt við støði í trigonometri.
- At lærlingurin dugir at nýta ISO sum forritanarmál við ella uttan radiuskompensering.
- At lærlingurin hevur kunnleika til cyklus/dialog forritan og dugir at planfresa formin uttaná einum luti, og lummafresing umframt at skrub- og slættfresa innara og uttara form.
- At lærlingurin dugir at velja røtt amboð til givnar uppgávur og rokna skurðferð, snúningar og tilspenning, umframt at áseta slættleika á lutinum.
- At lærlingurin dugir at finna feilir í verandi ISO forritum.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 3, 6 og 7.

Sergrein: § 13 nr. 2, 3, 8, 11, 12 og 17.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við luttøkuváttan og støðumeti.

# Námsætlan 5: Fyrstahjálp

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 12 (tað til ein og hvørja galdandi hjá Dansk Rødekors)

## Lýsing av lærugreinini

Undirvíst verður í, hvussu ein er førur fyri at halda lív í ella fáa lív aftur í persón eftir vanlukku ella brádligari sjúku til bjargingarfólk ella lækni kemur á staðið.

Talan er um fyrstahjálp á byrjanarstigi, tvs. grundskeið.

Undirvíst verður í fyrstahjálp samsvarandi leiðreglum hjá Dansk Rødekors – Dansk

Førstehjælpsråd (DFR). Undirvísari skal hava fullgilt "instruktørprógv" fyri at kunna undirvísa í fyrstahjálp.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- Duga teir 4 høvuðshættirnar í fyrstuhjálp.
- Duga fyrstuhjálp tá talan eru hjartasteðg við og uttan hjartastartara.
- Duga fyrstuhjálp til bløðandi persón.
- Duga fyrstuhjálp til persón fremmandalikam í andaleiðini.
- Duga at flyta ella lyfta persón við skaða.
- Vísa kunnleika til sálarliga fyrstuhjálp
- Vísa kunnleika um m.a. blóðrenslið og andaleiðina.

## Lærugreinin styðjar fylgjand førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 8.

## Próvtøka / eftirmeting

Í fyrstahjálp fer próvtøkan fram samsvarandi reglugerð hjá Dansk Rødekors – Dansk Førstehjælpsråd.

Luttøkuváttan. Serskilt prógv verður latið fyri luttøku.

# Námsætlan 6: Eldsløkking

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 4

## Lýsing av lærugreinini

Undirvíst verður í kunnleika um at fyribyrgja, at eldur festur í, og hvussu ein skal bera seg at um eldur er í. Eisini verður undirvíst í, hvussu ein við einføldum hjálparamboðum og –hættum kann sløkkja smærri eldar og forða eldi í at breiða seg.

Lærlingurin fær prógv í eldsløkking á byrjanarstigi (grundskeið).

Undirvíst verður í eldsløkking samsvarandi leiðreglum hjá "Dansk Brand- og sikringsteknisk Institut" (DBI). Undirvísari skal hava fullgilt "instruktørprógv" fyri at undirvísa í eldsløkking.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin hevur kunleika um eldástøði og grundleggjandi sløkkiástøði.
- At lærlingurin dugir at fyribyrgja eldáseting.
- At lærlingurin dugir at sløkkja smærri eldar.
- At lærlingurin dugir ávaringarmannagongdir.
- At lærlingurin hevur kunnleika um serligar eld- og spreingivágar.
- At lærlingurin hevur kunnleika um m.a. brandteppi, pulvur-, CO2-, vatn- og skúmsløkking.

## Lærugreinin styðjar fylgjand førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 8.

## Próvtøka / eftirmeting

Krav er um virkna luttøku.

Luttøkuváttan. Skeiðsváttan verður latin til luttakaran

# Námsætlan 7: Maskinástøði

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Framkomið stig
**Vegleiðandi tímatal**: 100

## Lýsing av lærugreinini

Undirvíst verður í maskinástøði og í praktiskum arbeiðsuppgávum og trupulleikaloysnum. Dentur verður lagdur á at skyna á avleiðingar av valdum tilfari, framferðarhátti, teknikki og góðskueftirliti.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin sýnir grundleggjandi vitan í nýtslu av amboðum innan maskinfakið, maskinum, mátitólum og arbeiðshættum, neyðugum formlum, rokniamboðum, herundir umhvørvi/reingerð, viðlíkahald og trygd.
- At lærlingurin í arbeiðinum við ymiskum tilfari og amboðum sýnir vitan innan at savna og brúka viðkomandi kunnleika, spesifikatiónir, tekningar, dokumentatiónsmannagongdir og lýsingar til at loysa einstakar arbeiðsuppgávur.
- At lærlingurin vísir fatan av samanhangi ímillum økonomi, tilfarsnýtslu og arbeiðstíð.
- At lærlingurin vísir kunnleika til viðkomandi heimlig og altjóða krøv og mannagongdir, sum verða brúkt á arbeiðsmarknaðinum.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 1 og 2.

Sergrein: § 13 nr. 8, 10, 5, 13, 14 og 17.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumeti og próvtøku.

# Námsætlan 8: Montasja

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Vanastig
**Vegleiðandi tímatal**: 152

## Lýsing av lærugreinini

Tryggja at lærlingurin við støði í individuellu læruni í grundskeiðinum, arbeiðir víðari og breiðkar sítt fakliga og almenna støði innan maskinfakið.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin við viðkomandi amboðum, kann hjálpa til við demontasju/montasju og viðlíkahaldi av einum dieselmotori. Skal skilja hjálpiskipanir og evnir, sum eru tengd at dieselmotorrakstri, so sum brennievni, køling, startluft, turboløðing, smyrjuolju, umframt at hava skil fyri nýtslu og burturbeining av oljum og feittum.
- At lærlingurin kennir til upprætting av samankoyrandi eindum.
- At lærlingurin útfrá viðkomandi manualum/tabellum hevur skil fyri vali av legum, tetningum, læsingum og pasningi/montasju av hesum.
- At lærlingurin skal hava skil fyri teringi orsaka av galvaniskum spenningi, yvirgangi, kavitatión og tálmandi tiltøkum ímóti sama.
- At lærlingurin kennir til grundleggjandi el, - herundir javnstreym og veksilstreym, kortslutning, avløðing og harav viðkomandi fylgjur og tálmandi tiltøk.
- At lærlingurin kann við hjálp av sjálvgjørdum frymli og viðkomandi sveisihættum, gera eitt kølivatnsrør v/ flangsum ímillum tvey føst punkt.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

| | |
|---|---|
| Førleikamál: Metal: | § 1 nr. 1 og 2. |
| Sergrein: | § 13 nr. 2, 3, 8, 10, 11, 16 og 17. |

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við luttøkuváttan og støðumeti.

# Námsætlan 9: Smiðjuarbeiði

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 52

## Lýsing av lærugreinini

Lærlingurin fær eina grundleggjandi verkliga og ástøðiliga vitan um smiðjuøkið - og breiðkar sítt fakliga støði, til partvíst eisini at umfata smiðjufakið.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- Grundleggjandi smiðjuarbeiði, sum stuðlar undir verkligt arbeiði innan stál, plátu og rør.
- At velja og fremja egnaðar arbeiðshættir til at skera og forma skurð í plátur, rør og tvørskurðir við atliti at galdandi standardum.
- At velja út - og fremja egnaðar samankomingshættir av stáli. (Ymisk sløg av sveising)

## Lærugreinin styðjar fylgjand førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 1 og 2.

Sergrein: § 13 nr. 18 og 19.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við próvtøku.

# Námsætlan 10: Smiðjuástøði

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi** tímatal: 28

## Lýsing av lærugreinini

Undivíst verður í ástøði og við praktiskum arbeiðsuppgávum og trupulleikaloysnum verður dentur lagdur á at skyna á avleiðingum av valdum tilfari, framferðarhátti, teknikki og góðskueftirliti.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin sýnir grundleggjandi vitan í nýtslu av amboðum, sum verða nýtt innan smiðjufakið, maskinum, mátitólum og arbeiðshættum, neyðugum formlum, rokniamboðum, herundir umhvørvið/reingerð, viðlíkahald og trygd.
- At lærlingurin í arbeiðinum við ymiskum tilfarið og amboðum dugir at savna og brúka viðkomandi kunnleika, spesifikatiónir, tekningar, dokumentatiónsmannagongdir og lýsingar til at loysa einfaldar arbeiðsuppgávur.
- At lærlingurin skilur samanhang ímillum økonomi, tilfarsnýtslu og arbeiðstíð.
- At lærlingurin sýnir kunnleika til viðkomandi nationalar og altjóða standardir og normar, sum verða brúktir á arbeiðsmarknaðinum.

## Lærugreinin styðjar fylgjand førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

| | | |
|---|---|---|
| Førleikamál: Felags: | | § 11 nr. 1 og 2. |
| Sergrein: | | § 13 nr. 18 og 19. |

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við próvtøku.

# Námsætlan 11: Spóntakandi arbeiði

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Framkomið stig
**Vegleiðandi tímatal**: 474

## Lýsing av lærugreinini

Undirvíst verður í at leggja til rættis og útinna uppgávur við vanligum spóntakandi maskinum.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin við støði í evnistekningum dugir at útinna framleiðslu av evnum sambært arbeiðsstandardi IT-7 á hondstýrdum fresarum og dreyibonkum.
- At lærlingurin við støði í arbeiðstekningum dugir at velja røttu skeriamboðini og besta arbeiðshátt til eina givna uppgávu.
- At lærlingurin dugir at útinna longdar, plan og konusdreying umframt útboring, stinging og gevindskering, boring, ríving og roulettering á dreyibonki. Lærlingurin dugir harumframt at gera neyðugar útrokningar til givnar uppgávur.
- At lærlingurin dugir at dreya innaní og uttaná, eitt nú útdreying, gevindskering, stinga og gera frígang.
- At lærlingurin dugir at gera plan-, spor-, deila- og umskapa útsjóndina á einum luti við eini fresimaskinu.
- At lærlingurin hevur kunnleika til vanlig hjálpitól til alla vanliga framleiðslu, eitt nú rundbord, deilitóli, pinolstuðli, brillustuðli og langdorn.
- At lærlingurin dugir at merkja, útinna hol og gera samanboringar af maskinpørtum.
- At lærlingurin dugir at slípa borir og dreyistál sambært krøvunum til eina givna uppgávu.
- At lærlingurin dugir at leggja til rættis neyðuga skjalatilfarið til eina givna uppgávu.
- At lærlingurin dugir at velja tilfarsgeometri við støði í viðkomandi standardum, eitt nú í samband við leigupasningar, kíla/not pasningar og frígangsstandardum v.m.
- At lærlingurin er tilvitaður um góðsku tá tað ræður um arbeiðsuppgávur og arbeiðsmaskinur.
- At lærlingurin dugir at vegleiða onnur í skjalprógvan, uppsetan og nýtslu av vanligum hondstýrdum arbeiðsmaskinum.

-

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 1, 2

Sergrein: § 13 nr. 2,3,5,8-11,13,17

# Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumeti og próvtøku.

# Námsætlan 12: Stýringstøkni

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Vanastig
**Vegleiðandi tímatal**: 80

## Lýsing av lærugreinini

Undirvíst verður í at uppbyggja, forrita, finna feilir og gera aftur einfaldar stýringstekniskar skipanir.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin dugir at nýta pneumatisk súmbolir og gera pneumatikdiagramm við nýtslu av pneumatiskum ventilum.
- At lærlingurin dugir at uppbyggja, avprøva og ígongdseta smærri pneumatiskar stýringar við støði í diagrammum.
- At lærlingurin dugir at máta streym, spenning og mótstøðu við einum multi-metri.
- At lærlingurin dugir at velja røttu lutirnar til at uppbyggja og royna smærri relæstýringar við start/stop virknaði, umframt at stýra tíðarrelæum við støði í lyklaskemaðum.
- At lærlinguin, við støði í hydralikkdiagrammum og kunnleika til virkisháttin hjá vanligum hydralikklutum, dugir at uppbyggja og seta í gongd smærri hydralisk annlegg.
- At lærlingurin hevur vitan um viskositet, additivir og viskositetsindeks.
- At lærlingurin hevur kunnleika til týdningin av filtrum í einum hydraliskum annleggi.

-

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 1 og 2.

Sergrein: § 13 nr. 2, 7 og 17.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við luttøkuváttan og støðumeti.

# Námsætlan 13: Sveising

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Vanastig
**Vegleiðandi tímatal**: 96

## Lýsing av lærugreinini

Undirvíst verður í at útinna samansetingarhættir í eini framleiðslutilgongd samsvarandi galdandi standardum, íroknað mekaniska og termiska skering, sveising og lodding við meira.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin dugir at útinna samankomingarhættir við elektrodusveising.
- At lærlingurin dugir at útinna samankomingarhættir við MAG-sveising.
- At lærlingurin dugir at útinna samankomingarhættir við TIG-sveising.
- At lærlingurin dugir at útinna samankomingarhættir við gassveising
- At lærlingurin dugir at útinna samankomingarhættir við lodding

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

| | | |
|---|---|---|
| Førleikamál: | Felags: | §11 nr. 1 og 2. |
| Sergrein: | | §13 nr. 18 og 19. |

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við próvtøku.

# Námsætlan 14: Tekning

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 44

## Lýsing av lærugreinini

Lærlingurin fær frálæru í tekniteknik, nýtslu av vanligum tekniamboðum, faktekning/projektiónstekning, og hvussu hesar tekningar brúkast í samband við tilgerð og montasju við støði í galdandi reglum innan konstruktiónstekning.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin dugir at framleiða og avlesa faktekningar sambært DS/ISO, herundir eisini mátseting, snit, mátilutfall, toleransur og hjálparmyndir.
- At lærlingurin dugir at gera og avlesa tekningar í rættvinklaðum projektión og isometriskari avmynding
- At lærlingurin dugir at gera útfellingsuppgávur.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 7.

Sergrein: § 13 nr. 3 og 17.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumeti.

# Námsætlan 15: Tilfarslæra

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Vanastig
**Vegleiðandi tímatal**: 24

## Lýsing av lærugreinini

Undirvíst verður í hugtøkum og terminologi, ið hevur at gera við viðkomandi tilfar. Í frálæruni verður dentur lagdur á ymisk tilfar, eginleikar, nýtsluøkjum og trygdina í samband við nýtslu av ymiskum evnum/tilfari. Støðið verður tikið í yrkisfakligum ástøði.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- At lærlingurin sýnir kunnleika til eginleikarnar hjá ymiskum stálsløgum, serstakliga harðleika og úthaldni í samband við ymiskar arbeiðshættir.
- At lærlingurin sýnir kunnleika til styrki- og royndarhættir av ymiskum metalli.
- At lærlingurin sýnir kunnleika til eginleikar hjá ymiskum metallum, kompositt og plasttilfari.
- At lærlingurin sambært tilfarsvegleiðingum dugir at velja skerigeometri og bestu amboðini til givnar uppgávur.
- At lærlingurin dugir at gera útrokningar í mun til hitaútvíðkan í ymiskum tilfari.
- At lærlingurin dugir at greiða frá teimum trygdarkrøvum, sum verða sett til handfaring av vandamiklum evnum, í samsvar við ásetingarnar frá arbeiðseftirlitinum.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

| | | |
|---|---|---|
| Førleikamál: | Felags: | § 11 nr. 1, 2 og 8. |
| Sergrein: | | § 13 nr. - |

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við luttøkuváttan.

# Námsætlan 16: Motorlæra

**Lærugreinabólkur**: Yrkisvallærugrein
**Torleikastig**: Framkomið stig
**Vegleiðandi tímatal**: 120

## Lýsing av lærugreinini

Eftir loknan lestur skal lærlingurin í lærugreinunum motorlæru (bygnaður, arbeiðsgongd og rakstur), elskipanir á skipi, motoreftirlit, eldsløkking og –útgerð og hjálpiskipanir hava so holla vitan, at viðkomandi trygt kann røkja hesa útgerð undir øllum umstøðum.

Lærlingarnir fáa serkilt prógv frá Vinnuháskúlanum sum motorpassari áljóðandi 749 KW.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Eftir lokna útbúgving skal motorpassarin:

- Hava kunnleika til høvuðslutirnar í einum dieselmotori
- Kunna greiða frá arbeiðsgongdini í einum dieselmotori
- Duga at seta í gongd, passa og steðga einum dieselmotori
- Hava kunnleika til elskipanirnar umborð
- Kunna fremja eftirlit við dieselmotorinum
- Duga at sløkkja eld og duga at handfara eldsløkkiútgerð
- Kunna røkja og handfara ymiskar hjálpiskipanir umborð
- Hava kunnleika til umhvørvisvernd

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál: Felags: § 11 nr. 1,2,8

Sergrein: § 13 nr. 1,4,11,16

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við próvtøku (Vinnuháskulanum (VH).